# Frágreiðing til aðalfundin hjá Svimjisambandi Føroya




Fyri tíðarskeiðið 6. juni 2019 til 16. mai 2020

ATLANTIC AIRWAYS

# Felagsskapurin

## Starvsnevnd

Hesa tíðina var starvsnevnd SSF: Rókur í Jákupsstovu, formaður, Símun Michael Sørensen, næstformaður, Ólavur Hansen, skrivari, Sørin S. Djurhuus og Eyðun Húsgarð, nevndarlimir, umframt Dann Hjelm, tiltakslimur. Samstarvið hevur riggað væl.

## Undirnevndir

SSF hevur enn trupulleikar við at fáa mannað sínar undirnevndir, ið eiga at vera í øllum førum ein teknisk svimjinevnd mannað av FINA-reglukønum fólki, umframt ein kappingarnevnd til at taka sær av praktisku fyriskipanini av meistarastevnum SSF.

Tí hevur starvsnevnd SSF røkt eisini hesar uppgávur, saman við aðalskrivaranum og sjálvbodnum serliga úr vertsfelagnum hjá viðkomandi meistarastevnu, sum í hesum tíðarskeiði var Havnar Svimjifelag í sambandi við FM á stuttgeil 2019 og NM/NJM 2019.

Tað hevur fyri so vítt riggað útmerkað; men hevur starvsnevndin tó í vár tikið avgerð um at vilja krevja at serliga tekniska svimjinevndin verður mannað - um ikki annað ber til, so við einum umboði úr hvørjum felag, sum tá er fast umboð har millum kalendarafundir.

Av øðrum møguligum nevndum kunnu nevnast landsliðsnevnd og mastersnevnd, ið heldur ikki hava verið mannaðar nú í fleiri ár, við í øllum førum teirri avleiðing at árliga meistarastevnan fyri masters (FOMM) mátti niðurleggjast.

## Dómsnevnd

Í dómsnevndini eru Anni á Hædd, forkvinna, og nevndarlimir Poul Poulsen og Jórun Eið Johannesen. Hesa tíðina var einki mál sent teimum at viðgera.

## Dómarar

Hesi seinastu árini hava útbúnu yvirdómarar okkara verið Dann Hjelm, Elin Matras, Katja Lervig, Thurid Kjærbo, Annika N. Johannesen og Rúni Gaardbo, harav Dann Hjelm hevur verið á FINA lista sum altjóða dómari síðani 2010, og Katja Lervig og Rúni Gaardbo síðani 2019, umframt at Erling Eidesgaard og Eyðun Húsgarð í 2019 komu á FINA lista sum altjóða startarar.

Hesir útbúnu yvirdómarar og startarar eru alneyðugir fyri okkum, til at tryggja at okkara stevnur eru í samsvar við galdandi FINA reglur; umframt okkara altjóða dómarar og startarar av tí at FINA nú krevur hesar til at kunna góðkenna svimjistevnur sum úttøkustevnur til HM og OL. Trýstið er ríkiliga høgt á hesi fáu, og ætla vit tí í næstum at fara undir eitt nýtt útbúgvingarskeið, til at vaksa um hópin.

## Svimjiskúlin

Jórun Eið Johannesen er saman við Pálini Olsen og Rúna Gaardbo oddafólk í Svimjiskúla Føroya, umframt at vit hava Johan Petur Poulsen, Lis Gøthe í Jákupsstovu og Rók í Jákupsstovu eisini útbúgvin til at undirvísa í skipanini. Svimjiskúlin skipaði fyri einum skeið í Vági í mars 2019, og hevur roynt at bjóða út onnur skeið eisini, sum tó vórðu avlýst vegna ov lítla undirtøku.

## Lívbjarging

Sørin S. Djurhuus stendur saman við Djóna Dalsgarð á odda fyri lívbjargingarátaki okkara, sum serliga fæst við at útbúgva lívbjargarar til okkum í føroysku svimjingini og hjá stovnum, kommunum, skúlum og øðrum felagsskapum, umframt at eftirkanna tilbúgvingina í føroyskum svimjihallum.

Virksemið er serliga at skipa fyri regluligum lívbjargararoyndum, sum samstundis eru árlig uppfrískan í lívbjarging og í tilbúgvingini á staðnum har lívbjargarin virkar.

SSF varð í 2019 atlimur í evropeiska og altjóða lívbjargingarsambondunum ILSE/ILS, sum gevur nýggjar møguleikar til hvussu vit kunnu byggja upp eina altjóða góðkenda lívbjargingarskipan.

## Skrivstova og roknskapur

Djóni Dalsgarð hevur verið aðalskrivari SSF síðani 2009, afturat í 1992-1996, við ábyrgd fyri dagliga virkseminum á skrivstovuni, umframt at hava nógvar aðrar uppgávur so sum at vera skrivari á starvsnevndarfundum og líknandi, og at luttaka í fyriskipanini av tiltøkum og stevnum SSF.

Tað hevur riggað fyrimyndarliga væl, og eru vit tí hørm um at hann nú hevur fráboðað at hann ynskir at gevast, tíbetur við sera góðari freist. Eg vil nýta høvið at takka Djóna fyri hansara stóra part til at menna føroyska sviming og lívbjarging, ífall at hann ikki er her næstu ferð at vit halda aðalfund.

Símun Michael Sørensen hevur síðani 2014 verið bókhaldari og kassameistari hjá SSF, umframt nú síðani 2019 eisini næstformaður SSF, og haldi eg meg kunna siga at vit við honum og góðari hjálp frá eisini grannskoðara okkara Menta hava munandi ment um okkara roknskap og bókhaldsskipan.

## Felagsskapurin

Afturat okkum sjálvum í nevndum SSF og feløgum, er ein rúgva av góðum kreftum í svimjingini, sum vit hava dúvað uppá, serliga í sambandi við meistarastevnur og landsliðsvirksemi. Hetta er dýrabærur stuðul, sum vit lukkutíð fáa meira ella minni fyri einki.

At nevna eru kalendarafundirnir og svimjiráðstevnurnar, sum hava verið tvær sera góðar keldur til hjálp og konsensus, tá ið tað kemur til at skipa virksemið innan føroyska svimjing, umframt sjálvsagt aðalfundirnir og aðrir fundir við formenn og onnur, til at viðgera tað sum nú einaferð er.

Hetta hevur alt sum heild riggað væl, og vit eru glað fyri, at feløgini eru røsk at melda aftur, eisini tá ið ynskini ganga ímóti okkara egnu ætlanum.

## Limir í føroyskum svimjifeløgum

Nú í mars 2020 vóru tað 703 skrásettir limir í føroysku svimjifeløgunum, harav 276 í HS, 115 í FLOT, 114 í Ægir, 92 í SuSvim, 58 í FS og 48 í Reysta,

Hetta er tíverri nakað væl lægri enn til dømis í oktober 2017, tá ið tey vóru 771 skrásettir limir, harav 287 í HS, 138 í SuSvim, 113 í Ægir, 93 í FLOT, 77 í Reysta og 63 í FS.

# Svimjiárið 2018-2019

## FINA stevnur í føroyskum svimjihallum

Føroysk svimjifeløg og SSF skipaðu hetta árið fyri tilsamans 14 FINA-góðkendum svimjistevnum í svimjihallum, harav 3 meistarastevnum, har málbólkurin vóru føroysk børn, ung og vaksin. FM á stuttgeil 2018 var góðkend av FINA sum úttøkustevna til HM á stuttgeil 2018, og FM á langgeil 2019 sum úttøkustevna til HM 2019 og OL 2020.

| Stevna | Staður | Dagfesting | Hylur | Kapp. | Feløg | Íðkarar | Lið | Úrslit | FINA* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| HS Open | Tórshavn | 1.-2. sep. 2018 | 25m | 38 | 4 | 79 | 15 | 465 | 713 |
| Ægir Open | Klaksvík | 6.-7. okt. 18 | 25m | 40 | 6 | 115 | 56 | 778 | 700 |
| FM á stuttgeil | Tórshavn | 26.-28. okt. 18 | 25m | 71 | 5 | 75 | 63 | 681 | 778 |
| HS Open | Tórshavn | 24.-25. nov. 18 | 25m | 40 | 6 | 84 | 22 | 440 | 756 |
| SMS Jólasprint | Tórshavn | 22. des. 18 | 25m | 31 | 5 | 107 | 33 | 444 | 741 |
| SuSvim Special | Vágur | 12.-13. jan. 19 | 50m | 30 | 5 | 88 | 0 | 408 | 684 |
| HS Open | Tórshavn | 9.-10. feb. 19 | 25m | 40 | 7 | 121 | 38 | 692 | 727 |
| SuSvim Open | Vágur | 23.-24. feb. 19 | 50m | 36 | 6 | 97 | 18 | 601 | 713 |
| Atlantic Open | Tórshavn | 29.-31. mar. 19 | 25m | 80 | 6 | 102 | 54 | 625 | 771 |
| FM á langgeil | Vágur | 26.-28. apr. 19 | 50m | 65 | 6 | 58 | 36 | 529 | 773 |
| ABMS | Klaksvík | 17.-19. mai 19 | 25m | 40 | 6 | 126 | 55 | 1238 | 716 |
| Grand Prix 1 | Klaksvík | 1. jun. 19 | 25m | 8 | 5 | 76 | 0 | 296 | 674 |
| Grand Prix 2 | Vágur | 8. jun. 19 | 50m | 8 | 5 | 69 | 0 | 259 | 717 |
| Grand Prix 3 | Tórshavn | 15. jun. 19 | 25m | 8 | 5 | 73 | 0 | 287 | 687 |

## Aðrar stevnur í føroyskum svimjihallum

Føroysk svimjifeløg skipaðu hetta árið fyri tilsamans 6 svimjistevnum í skúlahyljum styttri enn 25 metrar, fyri okkara yngstu aldursbólkar: Reysta-stevna í Leirvík hin 13. okt. 18, FS-stevna í Fuglafirði hin 17. nov. 18, FLOT-stevna á Toftum hin 26. jan. 19, Reysta-stevna í Leirvík hin 2. mar. 19, SuSvim-stevna á Tvøroyri hin 16. mar. 19 og HS-stevna á Argjum hin 6. apr. 19.

# Uttanlanda og altjóða stevnur

Føroyskir svimjarar kappaðust hetta árið tilsamans minst 1000 ferðir sum einstaklingar og 38 ferðir sum lið, á 23 uttanlanda stevnum, harav 5 vóru altjóða meistarastevnur. Á hesum stevnum vunnu okkara svimjarar minst 27 gull, 25 silvur og 29 bronsur.

Serliga nevnivert er, at Alvi Hjelm og Vár E. Eidesgaard vunnu ávikavíst silvur og bronsu á NM 2018, og at vit vunnu næstflest heiðursmerki av øllum á Oyggjaleikum: 12 gull, 6 silvur og 8 bronsur.

| Stevna | Land | Dagfesting | Hylur | Íðkarar | Lið | Úrslit | Gull | Silvur | Bronsa | FINA* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Sprintstævne | DEN | 14. sep. 18 | 25m | 2 | 0 | 5 | 1 | 0 | 2 | 570 |
| Madwave Challenge | DEN | 15.-16. sep. 18 | 25m | 2 | 0 | 8 | 1 | 1 | 3 | 702 |
| Øst Junior/Senior | DEN | 5.-7. okt. 18 | 25m | 2 | 0 | 9 | 0 | 1 | 0 | 738 |
| Saint-Dizier | FRA | 19.-21. okt. 18 | 25m | 11 | 0 | 32 | 0 | 0 | 0 | 740 |
| DM Kortbane | DEN | 1.-4. nov. 18 | 25m | 2 | 0 | 13 | 0 | 1 | 2 | 815 |
| Køge Open | DEN | 23.-26. nov. 18 | 25m | 37 | 18 | 298 | 0 | 2 | 4 | 544 |
| Aalborg Cup | DEN | 30. nov-2. des. | 25m | 1 | 0 | 7 | 0 | 0 | 2 | 626 |
| NM/NJM | FIN | 7.-9. des. 18 | 25m | 12 | 4 | 56 | 0 | 1 | 1 | 747 |
| HM á stuttgeil | CHN | 11.-16. des. 18 | 25m | 2 | 0 | 4 | 0 | 0 | 0 | 789 |
| Reykjavík International | ISL | 25.-27. jan. 19 | 50m | 46 | 0 | 284 | 9 | 9 | 5 | 713 |
| Swedish Grand Prix | SWE | 26.-27. jan. 19 | 50m | 2 | 0 | 12 | 0 | 1 | 0 | 714 |
| Lisbon WOS | POR | 9.-10. feb. 19 | 50m | 2 | 0 | 17 | 0 | 1 | 1 | 722 |
| Citta di Milano | ITA | 1.-3. mar. 19 | 50m | 2 | 0 | 9 | 0 | 0 | 0 | 732 |
| Cct Sabadell | ESP | 8.-10. mar. 19 | 50m | 2 | 0 | 11 | 0 | 0 | 0 | 715 |
| Edinburgh International | GBR | 16.-17. mar. 19 | 50m | 2 | 0 | 6 | 0 | 0 | 0 | - |
| Danish Open | DEN | 5.-8. apr. 19 | 50m | 2 | 0 | 13 | 0 | 0 | 0 | 753 |
| Bergen Swim Festival | NOR | 5.-7. apr. 19 | 50m | 13 | 0 | 61 | 0 | 0 | 0 | 783 |
| HS Andersen Cup | DEN | 24.-26. mai 19 | 50m | 2 | 0 | 14 | 3 | 1 | 0 | 710 |
| Madrid Open | ESP | 29.-30. jun. 19 | 50m | 2 | 0 | 12 | 1 | 1 | 1 | 746 |
| NatWest Island Games | GIB | 8.-11. jul. 19 | 25m | 13 | 16 | 116 | 12 | 6 | 8 | 765 |
| EYOF | AZE | 22.-26. jul. 19 | 50m | 5 | 0 | 15 | 0 | 0 | 0 | 664 |
| HM á langgeil | KOR | 21.-28. jul. 19 | 50m | 3 | 0 | 6 | 0 | 0 | 0 | 742 |
| World Cup Tokyo | JPN | 2.-4. aug. 19 | 50m | 1 | 0 | 3 | 0 | 0 | 0 | 739 |

# Landsliðshópar 2018-2019

## NM/NJM 2018 í Oulu

**Svimjarar**: Alisa Vestergaard (2003) og Róland Toftum (1998) úr SuSvim, Barbara Debes (2000), Bjørt A. Sigurðsson (2004), Rebekka Trygvadóttir (2004) og Rókur Trygvason (2000) úr Ægir, Eyðrið Mortensen (2003), Kristina í Skála (2005), Vár E. Eidesgaard (2001), Bartal E. Eidesgaard (2003), Johan N. Dam (2002), og Alvi Hjelm (1996) úr HS

**Venjarar**: Rúni Gaardbo og Bartal Hestoy

**Ferðaleiðari**: Anita R. Nysted

## HM á stuttgeil 2018 í Hangzhou

**Svimjarar**: Signhild Joensen (2000) úr Ægir og Óli Mortensen (1996) úr HS.

**Venjari**: Juan Jaime Arroyo Toledo

**Ferðaleiðari**: Anni á Hædd

## Bergen Swim Festival 2019 í Bergen

**Svimjarar**: Rói Bech (2001) og Sára R. Nysted (2001) úr SuSvim, Barbara Debes (2000), Rebekka Trygvadóttir (2004), Signhild Joensen (2000), Sólvá A. Sigurðsson (2002) og Rókur Trygvason (2000) úr Ægir, Eyðrið Mortensen (2003), Kristina í Skála (2005), Vár E. Eidesgaard (2001), Bartal E. Eidesgaard (2003) og Johan N. Dam (2002) úr HS og Birita Debes (1995) úr FLOT. Róland Toftum (2000) úr SuSvim var eisini úttikin, men mátti av persónligum ávum geva avboð, meðan Alvi Hjelm (1996) og Óli Mortensen (1996) úr HS valdu heldur at luttaka á Danish Open 2019.

**Venjarar**: Juan Jaime Arroyo Toledo, Pedro Prazeres og Panagiotis Christou

**Ferðaleiðari**: Anita R. Nysted

## Oyggjaleikir 2019 á Gibraltar

**Svimjarar**: Róland Toftum (1998) úr SuSvim, Barbara Debes (2000), Rebekka Trygvadóttir (2004), Signhild Joensen (2000) og Rókur Trygvason (2000) úr Ægir, Elisabeth Erlendsdóttir (2005), Eyðrið Mortensen (2003), Vár E. Eidesgaard (2001), Alvi Hjelm (1996), Bartal E. Eidesgaard (2003), Johan N. Dam (2002) og Óli Mortensen (1996) úr HS. Birita Debes (1995) úr FLOT var eisini úttikin, men mátti av persónligum ávum geva avboð.

**Venjarar**: Juan Jaime Arroyo Toledo, Panagiotis Christou og Pál Joensen

**Ferðaleiðarar**: Randi Holm og Eyðun Húsgarð

## EYOF 2019 í Baku

**Svimjarar**: Rebekka Trygvadóttir (2004) úr Ægir, Elisabeth Erlendsdóttir (2005), Kristina í Skála (2005), Ronja Ró í Dímun (2004) og Bartal E. Eidegaard (2003) úr HS.

**Venjari**: Panagiotis Christou

**Ferðaleiðari**: Panagiotis Christou

## HM á langgeil 2019 í Gwangju

**Svimjarar**: Signhild Joensen (2000) úr Ægir, Alvi Hjelm (1996) og Óli Mortensen (1996) úr HS.

**Venjari**: Juan Jaime Arroyo Toledo

**Ferðaleiðari**: Lis Gøthe í Jákupsstovu

# Føroysk met og juniormet

Svimjiárið 2018-2019, tað vil siga frá 1. september 2018 til 31. august 2019, settu føroyskir svimjarar tilsamans 25 føroysk met og 4 føroysk juniormet.

Til samanberingar settu føroyskir svimjarar tilsamans 19 føroysk met og 23 føroysk juniormet, undanfarna svimjiárið 2017-2018.

Metlistarnir vórðu um ársskiftið 2017/2018 fluttir til SwimRankings við leinki frá heimasíðu SSF, og tað tykist at rigga væl. Um ársskiftið 2018/2019 komu landsliðsmetini yvir eisini.

## Føroysk juniormet

| Teinur | Grein | Hylur | Kyn | Tíð | Svimjari | Aldur | Felag | Stevna | Dagur | Land |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 200 | Bringa | 25m | M | 02:18.95 | Rókur Trygvason | 2000 | Ægir | FM á stuttgeil | 2018-10-26 | FAR |
| 4x100 | Frí | 50m | M | 03:55.27 | Jóhannis Erlendsson, Johan N. Dam, Jónas L. Schiller, Bartal E. Eidesgaard | 2002 | HS | SuSvim feb 19 | 2019-02-24 | FAR |
| 4x50 | Blandað | 25m | M | 01:54.13 | Rúni Bech, Rani Jacobsen, Rói Bech, Bartal Debess | 2001 | SuSvim | Atlantic Open | 2019-03-31 | FAR |
| 4x50 | Blandað | 25m | M | 01:52.64 | Hugin N. Lave, Rani Jacobsen, Rói Bech, Bartal Debess | 2001 | SuSvim | Atlantic Open | 2019-03-31 | FAR |

## Føroysk met

| Teinur | Grein | Hylur | Kyn | Tíð | Svimjari | Aldur | Felag | Stevna | Dagur | Land |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4x50 | Blandað | 25m | M | 01.50.85 | Bartal Debess, Rani Jacobsen, Róland Toftum, Rói Bech | 1998 | SuSvim | Ægir okt 18 | 2018-10-06 | FAR |
| 50 | Bringa | 25m | M | 00:28.55 | Róland Toftum | 1998 | SuSvim | FM á stuttgeil | 2018-10-28 | FAR |
| 4x200 | Frí | 25m | M | 07:38.64 | Bartal E. Eidesgaard, Rókur Trygvason, Alvi Hjelm, Johan N. Dam | 1996 | SSF | NM 2018 | 2018-12-08 | FAR |
| 1500 | Frí | 25m | K | 16:53.02 | Vár E. Eidesgaard | 2001 | HS | Atlantic Open | 2019-03-29 | FAR |
| 800 | Frí | 25m | K | 08:46.64 | Vár E. Eidesgaard | 2001 | HS | Atlantic Open | 2019-03-31 | FAR |
| 50 | Frí | 25m | M | 00:23.14 | Rókur Trygvason | 2000 | Ægir | Atlantic Open | 2019-03-31 | FAR |
| 4x50 | Blandað | 25m | K | 02:00.16 | Elisabeth Erlendsdóttir, Eyðrið Mortensen, Vár E. Eidesgaard, Ronja Ró í Dímun | 2001 | HS | Atlantic Open | 2019-03-31 | FAR |
| 800 | Frí | 50m | K | 09:08.50 | Vár E. Eidesgaard | 2001 | HS | BSF 2019 | 2019-04-05 | NOR |
| 100 | Rygg | 50m | K | 01:03.01 | Signhild Joensen | 2000 | Ægir | BSF 2019 | 2019-04-06 | NOR |
| 4x200 | Frí | 50m | M | 08:01.67 | Bartal E. Eidesgaard Óli Mortensen Johan N. Dam Alvi Hjelm | 1996 | HS | FM á langgeil | 2019-04-26 | FAR |
| 4x100 | Blandað | 50m | K | 04:33.08 | Signhild Joensen Rebekka Trygvadóttir Malan Jóhansdóttir Barbara Debes | 2000 | Ægir | FM á langgeil | 2019-04-26 | FAR |
| 200 | Firvald | 50m | K | 02:27.37 | Vár E. Eidesgaard | 2001 | HS | FM á langgeil | 2019-04-28 | FAR |
| 4x50 | Frí | 50m | M | 03:40.31 | Johan N. Dam Óli Mortensen Alvi Hjelm Bartal E. Eidesgaard | 1996 | HS | FM á langgeil | 2019-04-28 | FAR |
| 200 | Frí | 25m | K | 02:00.74 | Vár E. Eidesgaard | 2001 | HS | Oyggjaleikir 19 | 2019-07-08 | GIB |

| | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 100 | Bringa | 25m | M | 01:02.38 | Róland Toftum | 1998 | SuSvim | Oyggjaleikir 19 | 2019-07-08 | GIB |
| 4x50 | Frí | 25m | K | 01:46.86 | Vár E. Eidesgaard<br>Signhild Joensen<br>Barbara Debes<br>Elisabeth Erlendsdóttir | 2000 | SSF | Oyggjaleikir 19 | 2019-07-08 | GIB |
| 4x50 | Blandað | 25m | M | 01:43.50 | Alvi Hjelm<br>Róland Toftum<br>Óli Mortensen<br>Rókur Trygvason | | SSF | Oyggjaleikir 19 | 2019-07-08 | GIB |
| 50 | Bringa | 25m | M | 00:28.38 | Róland Toftum | 1998 | SuSvim | Oyggjaleikir 19 | 2019-07-09 | GIB |
| 1500 | Frí | 25m | K | 16:47.54 | Vár E. Eidesgaard | 2001 | HS | Oyggjaleikir 19 | 2019-07-09 | GIB |
| 400 | Frí | 25m | K | 04:17.18 | Vár E. Eidesgaard | 2001 | HS | Oyggjaleikir 19 | 2019-07-10 | GIB |
| 100 | Frí | 25m | K | 00:56.96 | Vár E. Eidesgaard | 2001 | HS | Oyggjaleikir 19 | 2019-07-10 | GIB |
| 4x100 | Blandað | 25m | M | 03:49.22 | Alvi Hjelm<br>Róland Toftum<br>Óli Mortensen<br>Rókur Trygvason | 1996 | SSF | Oyggjaleikir 19 | 2019-07-10 | GIB |
| 100 | Frí | 25m | K | 00:56.48 | Vár E. Eidesgaard | 2001 | HS | Oyggjaleikir 19 | 2019-07-11 | GIB |
| 4x100 | Frí | 25m | M | 03:26.08 | Alvi Hjelm<br>Rókur Trygvason<br>Bartal Eidesgaard<br>Óli Mortensen | 1996 | SSF | Oyggjaleikir 19 | 2019-07-11 | GIB |
| 4x50 | Frí | 25m | X | 01:39.52 | Barbara Debes<br>Vár E. Eidesgaard<br>Róland Toftum<br>Rókur Trygvason | | SSF | Oyggjaleikir 19 | 2019-07-11 | GIB |

# Svimjiárið 2019-2020

## FINA stevnur í føroyskum svimjihallum

Føroysk svimjifeløg og SSF hava til nú skipað fyri tilsamans 7 FINA-góðkendum svimjistevnum í svimjihallum, harav 1 meistarastevnu og 1 altjóða meistarastevnu, har málbólkurin vóru føroysk børn, ung og vaksin. Í mars hendi so tað at øll svimjing mátti niðurleggjast vegna coronasótt, so at í til nú 3 FINA-góðkendar stevnur mátti avlýsast og 2 útsetast.

| Stevna | Staður | Dagfesting | Hylur | Kapp. | Feløg | Íðkarar | Lið | Úrslit | FINA* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| HS Open | Tórshavn | 7.-8. sep. 19 | 25m | 36 | 4 | 80 | 0 | 424 | 708 |
| Ægir Open | Klaksvík | 5.-6. okt. 19 | 25m | 37 | 5 | 89 | 36 | 598 | 714 |
| FM á stuttgeil | Tórshavn | 1.-3. nov. 19 | 25m | 69 | 5 | 69 | 54 | 595 | 710 |
| NM/NJM | Tórshavn | 29. nov. - 2. des. 19 | 25m | 69 | 7 | 180 | 32 | 987 | 815 |
| HS Xmas Open | Tórshavn | 21. des. 19 | 25m | 31 | 5 | 80 | 30 | 376 | 658 |
| Ægir Open | Klaksvík | 15.-16. feb. 20 | 25m | 51 | 6 | 94 | 5 | 747 | 734 |
| SuSvim Open | Vágur | 29. feb. - 1. mar. 20 | 50m | 48 | 5 | 95 | 0 | 638 | 718 |
| HS Open - Avlýst | Tórshavn | 14. - 15. apr. 20 | 25m | | | | | | |
| HS B1-4 - Avlýst | Tórshavn | 18. apr. 20 | 25m | | | | | | |
| Atlantic Open - Avlýst | Vágur | 24. - 26. apr. 20 | 50m | | | | | | |
| ABMS - Útsett | Klaksvík | 8. - 10. apr. 20 | 25m | | | | | | |
| FM á langgeil - Útsett | Vágur | 30. mai - 1. jun. 20 | 50m | | | | | | |

## Aðrar stevnur í føroyskum svimjihallum

Føroysk svimjifeløg hava til nú skipað fyri tilsamans 3 svimjistevnum í skúlahyljum styttri enn 25 metrar, fyri okkara yngstu aldursbólkar: HS-stevna á Argjum hin 28. sep. 19, Reysta-stevna í Leirvík hin 12. okt. 10 og FLOT-stevna á Toftum hin 1. feb. 20. FS noyddist vegna hølistrupulleikar at útseta sína stevnu hin 23. nov. 19 fyri síðani at avlýsa hana hin 21. mar. 20, meðan Reysti vegna corona mátti fyrst útseta og síðani avlýsa sína hin 7. mar. 20, og SuSvim síðani sína til hin 21. mar. 20.

# Uttanlanda og altjóða stevnur

Føroyskir svimjarar kappaðust hetta árið tilsamans minst 1000 ferðir sum einstaklingar og 22 ferðir sum lið, á 9 uttanlanda stevnum, harav 2 vóru altjóða meistarastevnur. Á hesum stevnum vunnu okkara svimjarar minst 22 gull, 19 silvur og 17 bronsur.

Serliga nevnivert er, at Signhild Joensen (2000) úr Ægir vann 2 gull og Vár E. Eidesgaard (2001) úr HS 1 gull og 1 silvur á NM/NJM 2019 í Tórshavn.

Og at annars tað harmiliga er aftur her, at vit vegna coronasótt hava verið noydd at avlýsa ella útseta minst 2 uttanlanda stevnur, og sikkurt fleiri um vit telja stevnur hjá feløgum, umframt tær í summar.

| Stevna | Land | Dagfesting | Hylur | Íðkarar | Lið | Úrslit | Gull | Silvur | Bronsa | FINA* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Poseidon Team Cup | SWE | 6.-8. sep. 19 | 25m | 1 | 0 | 7 | 1 | 1 | 1 | 708 |
| DM-Ø | DEN | 4.-6. okt. 19 | 25m | 1 | 0 | 7 | 2 | 1 | 0 | 761 |
| World Cup Berlin | GER | 11.-13. okt. 19 | 50m | 1 | 0 | 3 | 0 | 0 | 0 | 773 |
| Íslandsmeistaramótið 25 | ISL | 8.-10. nov. 19 | 25m | 9 | 2 | 65 | 6 | 6 | 3 | 746 |
| Køge Open Køge | DEN | 22.-24. nov. 19 | 25m | 50 | 22 | 387 | 0 | 0 | 0 | 440 |
| Køge Open Herfølge | DEN | 23.-24. nov. 19 | 25m | 21 | 1 | 173 | 7 | 6 | 7 | 274 |
| Nordic Champs | FAR | 29. nov - 1. des. 19 | 25m | 15 | 8 | 87 | 3 | 1 | 0 | 779 |
| EM á stuttgeil | GBR | 4.-6. des. 19 | 25m | 3 | 0 | 9 | 0 | 0 | 0 | 731 |
| DM for hold | DEN | 13.-15. des. 19 | 25m | 1 | 0 | 2 | 0 | 0 | 0 | 706 |
| Reykjavík International | ISL | 24.-26. jan. 20 | 50m | 40 | 0 | 278 | 3 | 4 | 6 | 717 |
| Danish Open - Avlýst | DEN | 28. mar - 1. apr. 20 | 50m | | | | | | | |
| EM á langgeil - Útsett | HUN | 11.-16. mai 20 | 50m | | | | | | | |
| EJM - Avlýst | GBR | 1.-5. jul. 20 | 50m | | | | | | | |
| NMU - Avlýst | LTU | 11.-12. jul. 20 | 50m | | | | | | | |
| OL - Útsett | JPN | 24. jul-29. aug. 20 | 50m | | | | | | | |

# Landsliðshópar 2019-2020

## NM/NJM 2019 í Tórshavn

**Svimjarar**:  Alisa Vestergaard (2003) og Róland Toftum (1998) úr SuSvim, Barbara Debes (2000), , Jonna Joensen (2005), Rebekka Trygvadóttir (2004), Rókur Trygvason (2000) og Signhild Joensen (2000) úr Ægir, Elisabeth Erlendsdóttir (2005), Eyðrið Mortensen (2003), Kristina í Skála (2005), Nancy N. Dam (2005), Ronja Ró í Dímun (2004), Vár E. Eidesgaard (2001), Bartal E. Eidesgaard (2003) og Johan N. Dam (2002) úr HS. Óli Mortensen (1996, HS) var eisini úttikin, men gav avboð.

**Venjarar**: Balazs Sasvari, Panagiotis Christou og Juan Jaime Arroyo Toledo

**Ferðaleiðarar**: Yvonna og Óli Toftum

## Danish Open 2020 í Taastrup - Avlýst

**Svimjarar**: Bartal Debes (2002) og Róland Toftum (1998) úr SuSvim, Barbara Debes (2000), Rebekka Trygvadóttir (2004), Signhild Joensen (2000) og Rókur Trygvason (2000) úr Ægir, Elisabeth Erlendsdóttir (2005), Eyðrið Mortensen (2003), Kristina í Skála (2005), Ronja Ró í Dímun (2004), Vár E. Eidesgaard (2001), Bartal E. Eidesgaard (2003) og Johan N. Dam (2002) úr HS.

**Venjarar**: Balazs Sasvari og Panagiotis Christou

**Ferðaleiðari**: June og Trúgvi Jóhanson

## EM 2020 í Budapest - Útsett

**Svimjarar**: Signhild Joensen (2000) úr Ægir og Vár E. Eidesgaard (2001) úr HS.

**Venjari**: verður avgjørt seinni

**Ferðaleiðari**: verður avgjørt seinni

# Føroysk met og juniormet

Higartil hava føroyskir svimjarar sett tilsamans 5 føroysk met og einki føroyskt juniormet, hetta svimjiárið 2019-2020, tað vil siga frá 1. september 2019.

Til samanberingar settu føroyskir svimjarar tilsamans 25 føroysk met og 4 føroysk juniormet, undanfarna svimjiárið 2018-2019.

## Føroysk met

| Teinur | Grein | Hylur | Kyn | Tíð | Svimjari | Aldur | Felag | Stevna | Dagur | Land |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4x200 | Frí | 25m | K | 08:26.81 | Vár E. Eidesgaard<br>Signhild Joensen<br>Barbara Debes<br>Alisa Vestergård | 2000 | SSF | NM/NJM 2019 | 2019-11-29 | FAR |
| 400 | Frí | 25m | K | 04:14.59 | Vár E. Eidesgaard | 2001 | HS | NM/NJM 2019 | 2019-11-29 | FAR |
| 50 | Bringa | 25m | M | 00:28.37 | Róland Toftum | 1998 | SuSvim | NM/NJM 2019 | 2019-11-30 | FAR |
| 800 | Frí | 25m | K | 08:40.78 | Vár E. Eidesgaard | 2001 | HS | NM/NJM 2019 | 2019-12-01 | FAR |
| 50 | Frí | 25m | M | 00:22.94 | Rókur Trygvason | 2000 | Ægir | Ægir Open | 2020-02-15 | FAR |

# Annað virksemi 2018-2020

## Altjóða virksemi

SSF luttekur so vítt gjørligt altíð á teimum altjóða pallum, har vit verða væntað at luttaka, so sum í norðurlendska svimjisambandinum NSF, norðurlendska lívbjargingarbólkinum NLSG, evropeiska svimjisambandinum LEN, altjóða svimjisambandinum FINA, umfarmt nú eisini evropeiska lívbjargingarsambandinum ILSE og altjóða lívbjargingarsambandinum ILS.

Í svimjiárunum 2018-2019 og 2019-2020 vóru tiltøkini í øllum førum:

- 26. - 27. september 2018. NLSG ársfundur í Vierumaki
- 28. - 30. september 2018: NEG ráðstevna í Vantaa
- 10. desember 2018: FINA eykaaðalfundur í Hangzhou
- 30. - 31. januar 2019: NSF aðalskrivarafundur í Stockholm
- 20. mars 2019: LEN LSPD fundur í ES-parlamentinum
- 10. apríl 2019: NSF aðalfundur í Sankta Pætursborg
- 11. apríl 2019: LEN aðalfundur í Sankta Pætursborg
- 19. juli 2019: FINA aðalfundur í Gwangju
- 2. - 4. oktober 2019: NSLG ársfundur í Stockholm
- 5. - 10. oktober 2019: WCDP lívbjargingarráðstevna í Durban
- 6. desember 2019: NSF formansfundur í Glasgow
- 30. januar 2020: NSF aðalskrivarafundur í Tallinn

# Onnur SSF-tiltøk

SSF roynir eftir førimuni at skipa fyri stimbrandi tiltøkum í Føroyum og fyri føroyingar, afturat sjálvum kappingunum, til at betra um samstarv og førleikar hjá okkum innan svimjingini, og til at vaksa um áhugan fyri svimjing sum heild.

Í svimjiárunum 2018-2019 og 2019-2020 vóru tiltøkini í øllum førum:

- 16. september 2018: Svimjifagnaðardagur í Klaksvík
- 10. oktober 2018: FINA facilities vitjan í Tórshavn
- 12. oktober 2018: SSF aðalfundurin 2018 í Tórshavn
- 19. oktober 2018: Heystfagnaður í Tórshavn
- 3. november 2018: Svimjiskúlaskeið á Toftum
- 30. nov. - 2. des. 2018: FINA hjálparvenjaraskeið í Tórshavn
- 28. jan. - 1. feb. 2019: FINA venjaraskeið í Reykjavík
- 17. februar 2019: Svimjiskúlaskeið í Vági
- 8. - 10. mars 2019: SSF ráðstevna í Vági
- 22. - 24. mars 2019: FINA dómaraskeið í Tórshavn
- 8. - 10. apríl 2019: Katinka Hosszu v.m. á vitjan í Vági
- 10. - 12. mai 2019: FINA yvirdómaraskeið í Budapest
- 6. juni 2019: SSF aðalfundurin 2019 í Tórshavn
- 18. - 22. september 2019: FINA høvuðsvenjaraskeið í Reykjavík
- 26. oktober 2019: WinGrodan-skeið í Tórshavn
- 8. februar 2020: Kalendarafundur í Tórshavn
- 21. - 22. februar 2020: Talentlega í Klaksvík

# Stutt um okkara limaskapir

## ÍSF

ÍSF skipar tvær ferðir um árið fyri umboðstingum, har formenn og -kvinnur í sersambondunum møtast til at viðgera ymisk viðurskifti, ímillum aðalfundir ÍSF. Hetta seinasta árið hevur viðgerðin verið serliga um nýggja ÍSF-húsið umframt møguliga multihøll, um barnaváttanir og komandi býti av stuðlinum frá Løgtingum og Ítrottarvedding. Hartil fundast vit regluliga við serliga fíggjarnevnd ÍSF.

## NSF

Hetta árið hevur verið friðarligt í Nordic Swimming Federation, síðani limalondini á aðalfundinum í mai 2019 samdust um endurskoðari evstulóg, og til tað nærkaðist at skula senda inn valevni til ovastu nevnd í LEN. Ein formansfundur var í Glasgow í desember 2019, har vit samdust um valevni, men síðani hevur ávís órógv tí at svenska valevnið trekti seg, og at danska valevnið varð uppsøgd.

## LEN

Í LEN hevur Jon Hestoy umboðað okkum sum næstformaður í teknisku nevndini fyri open water svimjing (TOWSC), umframt undirritaði Rókur í Jákupsstovu sum skrivari í miðlanevndini, og sum umboð fyri SSF sum pilotland í stýrisbólkinum fyri svimjiførleikaátakinum LSPD (Learn-to-Swim, Prevent Drowning). Her hevur verið sera friðarligt serliga nú í vár við støðuni við COVID-19.

## FINA

Aftaná kampvalið í Budapest í 2017 hevur FINA veruliga lagt seg í selarnar, at bjóða sínum limalondum og kanska serliga okkum smáu burturav sínum ríkidømi, við fíggjarligum stuðli til menning og útbúgving og líknandi.

Hetta árið hava vit í SSF m.a. notið gott av teirra Olympic Aquatics Support Programme, umframt at vit fingu stuðul til Svimjifagnaðin í Klaksvík í september, til FINA Coaches Certification Programme skeiðið í Tórshavn í desember, og til FINA dómaraskeiðið í Tórshavn í mars. Hartil hava vit kunnað sent venjarar á skeið í Reykjavík, umframt dómarar á skeið í Budapest, sum vóru ókeypis tó so at vit luttakarar máttu gjalda í øllum førum partvíst fyri ferð og uppihald.

# Onnur tiltøk

## Parasport

Í desember var parasport fyri fyrsti ferð partur av 'okkara' NM í svimjing, og var ætlanin at vit síðani skuldu hýsa eisini hesum á NM/NJM í Tórshavn í ár. Tíverri sá norðurlendski aðalskrivarafundurin í januar seg noyddan at taka para-NM burtur úr NM/NJM 2019, millum annað tí at umstøðurnar í Havn vóru hildnar at vera ov trongar. Lukkutíð sluppu vit enn at hýsa restini av NM/NJM 2019.

## Úrval

Úrval játtaði til 2019 oyramerktan stuðul til hesar fimm svimjarar: Óla Mortensen (1996), Vár E. Eidesgaard (2001) og Alva Hjelm (1996) úr Havnar Svimjifelag, Signhild Joensen (2000) og Rók Trygvason (2000) úr Ægir. Harumframt aftur játtan til '15 tey næstbestu'.

Til 2020 játtaði Úrval so aftur oyramerktan stuðul til hesar fýra svimjarar: Vár E. Eidesgaard (2001) úr Havnar Svimjifelag, Signhild Joensen (2000) og Rók Trygvason (2000) úr Ægir, og Róland Toftum (1998) úr Suðuroyar Svimjifelag. Harumframt aftur játtan til '15 tey næstbestu'.

Umsitingarvirksemið í samband við Úrval er komið í eitt slag av fastari, um enn krevjandi, legu.

## Landslið

Virksemið við landsliðslegum lá stilt í heysthálvuni 2018, meðan fyrst SuSvim og síðani HS skiftu høvuðsvenjara. Á vári í 2019 vóru tvær landsliðlegur: Fyrst í Vági uppundir Bergen Swim Festival, og síðani aftur í Vági í sambandi við at Katinka Hosszú og Árpád Petrov vitjaðu, sum av FINA vórðu kosin heimsins bestu kvinnuligi svimjari og venjari í 2018.

Á heysti 2019 lá tíverri aftur stilt við venjingarlegum, vegna venjaraskifti, tíðarneyð og avbjóðingar við fígging. Nú í februar 2020 skipaðu nýggju FINA høvuðsvenjararnir hjá SSF fyri talentlegu í Klaksvík sum fekk sera góð viðmæli, og var ætlanin avgjørt at herja á við fleiri landsliðslegum, áðrenn coronasóttin knappliga legði alt stilt.

## Sálarfrøði og gransking

SSF gjøgnumførdi á vetri 2017-2018 eina verkætlan við ítróttarsálarfrøðinginum Jón Gregersen, sum tíverri er farin eitt sindur afturum aftur, í øllum førum í sersambandshøpi. Tað er tó lítil ivi um at hetta er og verður viðkomandi, og at vit tí eiga at umhugsa at taka hetta uppaftur.

## Gransking og útgerð

SSF hevur síðani 2018 gjørt íløgur í testútgerð og annað, sum liður í sokallaðu FOASP verkætlani, har FINA bjóðar fíggjarligan stuðul til menning av sersambondunum. Tíverri vóru okkara fyrstu royndir heldur miseydnaðar, har hátøkniliga Tritonwear-útgerðin vísti seg at vera trupul at innføra í dagliga venjing, og har eisini lítið sást aftur frá teirri á vetri 2018-2019 keyptu VO2Master-útgerð.

Vit hava tí valt at leggja um til útgerð ið vónandi er lættari at innføra, og at geva ávísum persónum við føstum tilknýti til SSF uppgávuna at fáa hana út í nýtslu á stevnum, venjingarlegum og kanska dagligari venjing eisini, heldur enn at lata hesa uppgávu yvir til venjarar hjá feløgum sum vit í 'miðfyrisitingini' ikki á sama hátt hava eitt fast tilknýti til.

Nú um árskiftið 2019-2020 er íløgan eitt Speed RT Velocity meter frá italsku AP Lab, umframt 100 WinnerCam at lána út beinleiðis til svimjarar og venjarar, við innleiðandi undirvísing. Hartil hava vit keypt eina sokallaða ATU-X tíðtakingarskipan frá svensku IC Control, til at kunna hava eltíð á stevnum í skúlahyljum, umframt í sambandi við NM/NJM 2019 eina grafikk-loysn eisini.

## Útbúgving

Hetta hevur longu verið nevnt nakrar ferðir í hesi frágreiðing, men umfataði hetta farna árið stutt sagt svimjiskúlaskeið til grundleggjandi svimjifrálæru, FINA venjaraskeið til kappsvimjivenjarar, umframt FINA dómaraskeið og yvirdómaraskeið til dómararnar runt kantin.

## Tøkni

Svimjisambandið mennir stútt um sínar tøkniligu skipanir, so at vit nú til dømis hava skipanir til talgilt at kunna fráboða met og kravtíðir, fráboðan um flyting millum feløg, umframt luttøku uttanlanda og nálatíðir. Eitt sum vit serliga arbeiða við nú, er at fáa betri skrásett alt hetta ymiska sum hendir innan SSF, umframt at so smátt byggja upp okkara egnu stroymingarloysn.

## Antidoping

Føroysk svimjing tekur sjálvsagt fult undir við miðvísa arbeiðnum hjá ÍSF saman við Antidoping Danmark og øðrum, at basa møguligari doping í ítrótti. Tí hava vit eisini eftir áheitan frá ÍSF lagt hendan boðskap út á heimasíðu okkara, við leinki til viðkomandi myndugleikar.

## Breidd

Tað vísir seg tíverri at vera trupult hjá SSF at náa út til eisini breiddina, nú vit fáu eru so fult upptikin av øllum hinum sum longu hendir innan SSF. Á sumri 2018 skipaðu vit fyri einum væleydnaðum svimjifagnaðardegi sum tað so tíverri ikki varð funnin tíð og yvirskot til aftur í 2019; og nú í 2020 er aftur ein heilt serlig støða við coronasótt. Vónandi verður tað tó skjótt, at vit kunnu bjóða inn aftur.

## Svimjifførleiki

Fyrst í 2018 skipaðu vit fyri tveimum kanningum av svimjiførleikum í Føroyum. Fyrst hjálpti Gallup okkum við eini kanning av vaksnum, og síðan spurdi vit allar næmingar í 5. flokki. Tað hevur tíverri verið trupult at finna tíð til greiningararbeiðið, men eru øll úrslitini teldutøk, og eru tí eisini tøk til at fáa hetta avgreitt tá ið tað nú einaferð liggur fyri.

## Svimjihallir

Umboð fyri SSF eru í fyrireikingarbólkum bæði í sambandi við ætlaða langhylin í Tórshavn, og við ætlaða stutthylin í Runavík. Hetta er virksemi sum krevur tol. Á heysti 2018 vóru vit við til at viðgera ætlaða langhylin í Havn saman við formanninum í FINA Facilities Committee, og í 2019 var formaður SSF partur av dømingarbólkinum í sambandi við ætlaða svimjihylin í Runavík.

## Stuðlar

Høvuðsstuðul hjá Svimjisambandi Føroya er Atlantsflog, sum hevur verið hollur stuðul í nú mong ár. Hartil hava vit nógvar aðrar trúgvar stuðlar serliga í sambandi við okkara meistarastevnur, umframt at fáa góðan stuðul frá teimum kommunum og felagsskapum sum vit nú einaferð hoyra til.

# Niðurløga

Hetta er endin á triðu setu míni sum formaður í Svimjisambandi Føroya - og hóast tað kennist sum um at vit so smátt vóru við at hava væl fatur á hesu ymiska, so eru vit nú knappliga í eini heilt serligari og álvarsligari støðu, vegna hesu íkomnu alheims coronasótt.

Eingin veit enn nær tað endar, og hvussu alt sær út tá ið komið er hartil. Fara vit at koma burturúr tí styrkt um stutta tíð, við uppbakningini og eldhuga til at halda áfram og mennast, ella verða vit knúskað vegna fíggjarkreppu og minkandi undirtøku frá limum og stuðlum?

Tað er lítil ivi um at fíggingin til SSF kann minka munandi í 2021, nú serliga stuðulin frá Løgtinginum og Ítróttarveddingini umvegis ÍSF er tengdur av hvussu stórt virksemi vit tá hava havt eisini í 2020, og nú ein so stórur partur hesum stuðli kemur frá tí sum føroyingar vedda uppá ítrótt.

Tað er rættiliga ivasamt um vit sleppa at hava eitt NM fyri masters í oktober mánaða, og tað er torført at spáa um hvussu nógvar limir vit fara at hava aftaná summarfrítíðina, nú so nógv í so langa tíð ikki hava kunnað luttikið í svimjiundirvísing og -venjing.

So gott sum alt stendur ósvarað, og tá eru vit ikki ein gang komin til hin stóra partin av okkara vanliga virksemi, sum eru altjóða kappingingar Alt várið og summarið 2020 er longu flutt til í 2021; men hvussu verður við tí í heyst og í vetur, og fyri tann skyld við tí í 2021?

Tað sum starvsnevnd SSF tí fyribils hevur valt at gera, er at fyrireika okkum sum frægast til tað sum vit nú einaferð eru sloppin og sleppa at gera og at tá gera tað so gott sum vit yvirhøvur duga og orka, fyri føroyska svimjing nú serliga her heima á klettunum.

So má heimurin bíða, ífall at hann ikki er tøkur. Vegna okkum í SSF vil eg takka fyri tað álit sum tit feløg sýna okkum, og takk til tykkum øll sum stríðast til frama fyri eisini føroyska svimjing.

Við svimjikvøðu
Tórshavn 16. mai 2020
Vegna starvsnevnd SSF
Rókur í Jákupsstovu